## TVINGSILSSØLA AV SKIPI

Týsdagin tann 17. mars 2009, kl. 09.00 verður á Dómaraskrivstovuni, undir Glaðsheyggi 14, 100 Tórshavn hildin tvingsilssøla yvir fiskiskipið Skørin, kallibókstavir OW2373, BRT 86,82 og NRT 33,86

Skipið er bygd í 1959 í Hálandi og liðugtbygt í 1960 í Danmark. Skipið er skrásett sum heimahoyrandi í Klaksvík. Eigarin av skipinum er Sp/f Mjóvin.

Fyrireikandi tvingsilssølufundur er ásettur at fara fram á Dómaraskrivstovuni, undir Glaðsheyggi 14, 100 Tórshavn týsdagin, tann 17. februar 2009 kl. 09.00, og verður tann, ið metur seg hava veð ella onnur rættindi í skipinum, innkallaður til fyrireikandi tvingsilssølufundin.

Tvingsilssølan er umbiðin av Inga Højgaard, adv,. Yvir við Strond 4, 100 tórshavn, tlf. 311260 (sak nr. 4550802), sum kann geva nærri upplýsingar um skipið og sum nærri avtala kann gerast við, um ynskt er at síggja skipi.

Áhugað kunnu síggja søluuppstilling og onnur skjøl í sambandi við tvingsilssøluna við at venda sær til Dómaraskrivstovuna tlf. 311003 (sak nr. AS 2-48/2008)

**Føroya Fútarættur, tann 14.01.09**

Veitst tú eina góða?

Ring til Sosialin tlf 341800



ADVOKATSKRIVSTOVAN

## TVINGSILS-SØLA

Týsdagin tann 24 februar 2009, kl. 09.00 verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir matr. Nr. 858ab, 859e og 860a, Tórshavn, sum er:

Vinnubygningur bygdur á allar tríggjar ognirnar

Talan er um bygningin hjá Restorffs Bryggarí.

Talan er um ein gamlan vinnubygning, sum er bygdur á allar tríggjar ognirnar.

Bygningurin kann lýsast soleiðis:

Talan er um ein gamlan bygning, sum er í trimum hæddum, 1. hædd 793 m², 2. hædd 268 m² og 3. hædd 60 m².

Berandi konstruktiónir, súlur, bjálkar og berandi skilaveggir eru úr betong. Innaru veggir í skrivstovuni eru úr timbur og byggiplátu. Loftið í framleiðsluhølum og loftið á goymslu er klætt við zink, annars er loftið úr viði.

Takkonstruktiónin er úr gittarsperrum.

Matr. Nr. 858ab er til støddar 273m², matr. Nr. 859e til støddar 421m² og matr. Nr. 860a til støddar 379 m².

Ognirnar verða seldar undir einum.

Niels Winther Poulsen, advokatur, Frúutrøð 4, Tórshavn, tel. 353335 nwp@jura.fo (j.nr. 20080940) hevur vegna konkursbúgvið, sum eigur ognina, biðið um tvingsilssøluna, og kann geva nærri upplýsingar um ognina. Søluuppgerð kann umbiðast hjá nevndu advokati alla hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6
FO-110 TÓRSHAVN
TEL 35 33 35 · FAX: 35 33 36
WWW.JURA.FO

# EM.Asfalt

**innandura fótbóltskapping verður í Runavík 31. januar og 1. februar. NSÍ skipar fyri kappingini**

**Aldursbólkar:**
Pinkur 7-9 ár (f. 1999-01)
Gentir 10-11 ár (f.1997-98)
Smágentir 12-13 ár (f. 1995-96)
Gentir 14-17 ár (f. 1991-94)

Pinkulingar 6-7 ár (f.2001-02)
Smápiltar 8-9 ár (f.1999-00)
Piltar 10-11 ár (f.1997-98)
Smádreingir 12-13 ár (f.1995-96)
Dreingir 14-16 ár (f. 1993-94)
Unglingar 17-19 ár (f 1990-91-92)

Við liðnum g.14-17 ár, dreingir 14-16 ár og unglingar eru 4 leikarar, málverji íroknaður. Við hinum liðunum leika 5 leikarar, málverji íroknaður.

Loyvt er at hava ein skiftisleikara á hvørjum liði. Liðini skulu hava egin nøvn, ella nevnast eftir fótbóltsfeløgum.

Heiðursmerkir verða latin til nr 1, 2 og 3 í hvørjum aldursbólki

Tilmelding á telefon 270635, 253866, 223184 ella á teldupost til herthao@post.olivant.fo í seinasta lagið mikudagin 28. januar kl. 19.00

**Kostnaður fyri hvørt liðið er 250 kr**

NES SÓKNAR NSÍ 1957 ÍTRÓTTARFELAG

# TIL SØLU

**Hús á Uppsalagøtu 29 í Klaksvík**

Vælhildin sethús í 3 hæddum. 46 m² hvør hædd.

**Kjallari:** Oljufýring og vask

**Miðhædd:** Køkur, 2 stovur, spískamar og gongd

**Loft:** 3 kømur, wc/brúskabina og gongd.

Grundøki 234 m². Húsini eru frá 1945. Vórðu høvuðsumvæld í 1980. Húsini verða seld, um hóskand boð fæst.

**Áhugað kunnu ringja 21 39 50**

Sosialurin
www.sosialurin.fo

TVØROYRAR KOMMUNA

## Avloysarastørv til Mýrifípuna í Trongisvági

Dagstovnurin Mýrifípan í Trongisvági, søkir eftir tímaløntum avloysarum, ið kunna avloysa á Barnagarðsstovunum og Útibarnagarðinum, tá tørvur er á tí. Starvið verður sett skjótast møguligt eftir 01. februar.

**Stovnslýsing:**
Mýrifípan er ein dagstovnur í Tvøroyrar Kommunu og samstarvskommununum í oynni. Stovnurin er skipaður í 5 eindir, vøggustova, 2 barnagarðsstovur, útibarnagarður og stuðulstoymið.

**Vit vænta av tær, at tú:**
- Hevur vilja og áhuga í at arbeiða við nógvum ymiskum børnum, í teirra foreldrum og nógvu ymisku starvfeløgunum.
- Hevur lætt við at umstilla teg eftir ymsum arbeiðsviðurskiftum
- Hevur góð samstarvsevnir
- Kanst arbeiða sjálvsstøðugt
- Vísir virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfeløgum
- Tímir væl at verða úti; hevur virðing fyri náttúruni

**Lønarviðurskifti:**
Løn sambart sáttmálað millum Føroya Pedagogfelag og KAF

Arbeiðstíðin er ímillum 7.30 – 18.00

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Guðruna Petersen, leiðara á tlf 372700

**Umsókn:**
Umsókn, saman við møguligum viðmælum, skal sendast til Dagstovnin Mýrifípan, Smærugøta 8, FO 826 Trongisvágur, innan 01.02.2009.

EIÐIS KVØLDSKÚLI

# Byrjanarskeið í tekstviðgerð

(Microsoft Word 2007)

**Undirvíst verður hesar leygardagar:**
31. jan.- 14. feb. – 28. feb. – 14. mars

Allar dagar frá kl. 14.00 – 18.00.

Luttøkugjald kr. 300, ið verður goldið við skeiðsbyrjan. Tilmelding fer fram hjá lærarunum Lenu Lastein tlf. 423502 ella 273212. t-postur: llastein@post.olivant.fo

**Eiðis kvøldskúli**
Kolsvegur 8 · 470 Eiði
tlf. 423092 / 229045 · Fax 423480
skulin@post.olivant.fo
www.eidisskuli.fo

Lesið Sosialin -so eru tit við!